**Dagstovnurin í Hoyvík**
**Vegurin Langi, 188 Hoyvík**
**Tlf. 317319, 317452**

## Kom og arbeið hjá okkum!

**Vit eru 10 fryntligir og ágrýtnir pedagogar, sum saman við okkara dugnaligu hjálparfólkum mangla starvsfelagar.**

**Vit hava brúk fyri 3 pedagogum, at byrja 1. august 2004.**

**1 pedagog 40 tímar í vøggustovu við 10 børnum, reyða hús.**

**1 pedagog 35 tímar í vøggustovu við 10 børnum, grøna hús.**

**1 pedagog 20 tímar í barnagarð við 15 børnum, reyða hús.**

**Um stovnin:**
Vit eru ein sjálvsognarstovnur, normerað til 72 børn, 30 vøggustovubørn og 42 barnagarðsbørn. Vit hava 3 barnagarðsstovur og 3 vøggustovur, sum eru býttar upp í 3 hús, 1 barnagarðs- og vøggustova í hvørjum húsi.

Uttan fyri er ein góður garður, sum er mennandi fyri børnini og góður at spæla í.

**Løn:**
Lønin er sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag. Freistin at søkja er 28. juni kl. 12.00.

Eru spurningar um arbeiðini, ring til Jóhannu tlf. 317319 ella 317452, lokal 15.

Leiðslan tekur sær rætt til frítt at velja ímillum umsóknirnar ella ongan at seta.

Umsóknir skulu sendast til:

**Dagstovnurin í Hoyvík**
**Vegurin Langi**
**188 Hoyvík**
**Viðmerkjast pedagogstarv**

## Renault Megane Scenic 1.6



Árgangur mai 1997, bensinmotorur, koyrt 84.000 km, vínreyður. Eykaútgerð: 2 sóltøk, sleipikrók.

Til sølu um hóskandi boð fæst.

**Meiri kann fáast at vita á tlf. 219714**

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

## Hægri lestur á Føroyamálsdeildini

Í september byrjar B.A.- og M.A.-lestur í føroyskum máli og bókmentum.

**B.A. í føroyskum máli og bókmentum**
Lesturin tekur trý ár og er skipaður í ein máltátt og ein bókmentatátt, umframt vísindaástøði og samskifti.

Endamálið við lestrinum er at ogna sær kunnleika til eldri og nýggjari føroyskt mál og bókmentir, umframt vísindaligt háttalag. Onnur norðurlendsk mál og norðurlendskar bókmentir eru partar av lestrinum.

Upptøkutreyt er students- ella HF-prógv. Onnur samsvarandi útbúgving kann góðtakast eftir umbøn í hvørjum einstøkum føri.

**M.A. í føroyskum máli og bókmentum**
Námið er tvey ára framhaldslestur fyri tey, ið hava lokið B.A.-prógv í føroyskum máli og bókmentum, og veitir serkunnleika í valdum málsligum og bókmentaligum evnum. Upptøkutreyt er B.A.-prógv í føroyskum máli og bókmentum.

Umsóknarfreistin til bæði námini er 1. juli 2004.

Nærri upplýsingar og umsóknarbløð fáast á:

**Føroyamálsdeildini**
**Fróðskaparsetur Føroya**
V. U. Hammershaimbsgøta 16 · Postrúm 272
110 Tórshavn · tlf. 352520 · fax 352521
og á www.setur.fo

## Lærarar til Sernámsdepilin

Søkt verður eftir 4 lærarum at undirvísa í Skúlanum í Sernámsdeplinum skúlaárið 2004/2005.

**Størvini eru tíðaravmarkaði:**
3 størv frá 1. august til 31. juli 2005.
Og 1 starv frá 1. septembur til 31. desembur 2004.

Størvini eru við fullum tímatali.

Umsóknir skulu vera Sernámsdeplinum, Frælsið 32, Postsmoga 2036, FO 165 Argir, í hendi í seinasta lagi 22. juni 2004.

Størvini verða lønt sambært sáttmálað millum Føroya Lærarafelag og Figgjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Eyðun Gaard, skúlaleiðara tlf. 223712.

**Sernámsdepilin**

## Til sølu

Vegna Sp/f Johns Restaurant undir konkurs verða, um nóg høgt boð fæst, fylgjandi lutir hervið lýstir til sølu:

Toyota Corolla 1.9E stationwagon frá 09.2000, silvurgráur,

**Virkisgøgn og innbúgv í samband við matstovuvirksemi:**
1 stk. matstovugrill
12 stk. træborð við plátu
48 stk. stólar
3 stk. frystiboksir
2 stk. køliskáp
steintoy og annað

Virkisgøgn og innbúgv ynskist helst selt samlað.

Til ber at síggja lutirnar eftir nærri avtalu.

Áhugað verða biðin um at venda sær til Advokatskrivstovuna, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, att: Jens Andrias Vinther, adv. ft., e-mail: jav@jura.fo ella Birnu Joensen, skrivara, e-mail: bij@jura.fo

**Advokatskrivstovan**
**Fr. Petersensgøtu 9 · Tórshavn**
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Pouslen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Tlf. 31 11 45 · Telefax 31 15 25
e-mail: jura@jura.fo

## Haldarsvíkar skúli

Søkt verður eftir lærara til Haldarsvíkar skúla skúlaárið 2004/2005.

**1 starv við fullum tímatali fyri lærara í farloyvi**

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skúlaleiðaran á tlf. 423159.

Møguligar umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 3. juli 2004.

**Haldórsvíkar skúlastýri**
v/Martin Hansen
438 Langasandi

## Rudding

Tey, sum hava bilar uttan nummarspjøldur, bilvrak, lutir og útgerð annars á almennum vegi ella øki, verða biðin um at beina hesar burtur í seinasta lagi 1. juli 2004.

Verður hetta ikki gjørt, beinir kommunan lutirnar burtur fyri eigarans rokning.

**Vestmanna Kommuna**



## Felagsskúlin á Oyrarbakka

Søkt verður eftir lærarum í tíðaravmarkað størv skúlaárið 2004/2005.

2 fulltíðarstørv fyri lærarar í farloyvi.

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4.

Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi leygardagin 26. juni 2004.

Meira fæst at vita um størvini frá skúlastjóranum á tlf. 422084 ella 423098.

**Skúlastýrið fyri**
**Felagsskúlan á Oyrarbakka**
v/ Billy Hansen · FO-470 Eiði

## Hvalbiar skúli

Søkt verður eftir lærara til Hvalbiar skúla í tíðaravmarkað starv til skúlaárið 2004/2005 at lesa avlopstímar.

Starvið er umleið fult lærarastarv.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokki 18-1 til 27-4.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 24. juni 2004.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til fyrstalæraran, tlf. 375083 ella 215878.

**Hvalbiar skúlastýri**
v/ Róin Schrøter
850 Hvalba

## Leirvíkar skúli

Hesi størv eru ley at søkja skúlaárið 2004/05:

2 størv fulla tíð fyri lærarar í farloyvi
1 starv fulla tíð vegna avlopstímar
1 starv uml. 1/2 tíð vegna tíma niðurskurð

Størvini eru tíðaravmarkað til skúlaárið 2004/05, og verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjrmálaráðið 18.1 til 27.7.

Meir fæst at vita um størvini á telefon 443234, 743234 ella 443379.

Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi mikudagin 23. juni 2004.

**Leirvíkar skúlastýri**
v/Jákup Tróndheim
Eggjarvegur 15
520 Leirvík

**Mentamálaráðið**
*Fólkaskúladeildin*

# Endurlýsing Lærugreinaráðgevi

**Starvið**
Í Landsmiðstøðini eru nakrir ráðgevatímar leysir at søkja til setanar frá 1. august 2004.

Ráðgevingin fevnir í fyrsta lagi um **støddfrøði, alis- og evnafrøði og náttúra/tøkni.**

Samanlagt eru 8 lønartímar um vikuna at søkja. Umroknað er hetta 533 fyrisitingartímar fyri árið.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar eiga at hava hollan ástøðiligan kunnleika og starvsligar royndir í viðkomandi lærugrein og starvsøki, starvið fatar um. Væntað verður, at lærugreinaráðgevin hevur førleika í og er hugaður at nýta kt í ráðgevastarvinum.

**Setanar- og lønartreytir**
Lærugreinaráðgevar verða settir eftir avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag og løntir í lønarflokki 30.3. Tann, ið settur verður, skal undirvísa írestandi tímarnar í skúlanum, har viðkomandi starvast dagliga.

**Starvslýsing**
Ein starvslýsing er galdandi fyri ráðgevastarvið. Eitt nú verður sagt:
- Ráðgevin skal í øllum lutum virka fyri einari námsligari menning í skúlanum
- Ráðgevin skal støðugt halda seg kunnugan við ta menning, sum er á námsliga, fakliga og tøkniliga økinum
- Ráðgeva viðvíkjandi undirvísingarmiðlum og arbeiðshættum í einstøku lærugreinunum.

Lagt verður upp til eitt skipað samstarv millum ráðgevarnar, møguliga í tvørgreinaligum bólkum og í toymum.

**Umsókn**
Umsóknir við prógvum o.ø. skulu vera Landsmiðstøðini, Hoyvíksvegi 72, Postrúm 3084, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mikudagin 30. juni 2004.

Gjøllari upplýsingar fáast frá Petur Simonsen, stjóra á Landsmiðstøðini, tlf. 318825.

**Mentamálaráðið og Landsmiðstøðin**

***Mentamálaráðið*** *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
***Landsmiðstøðin*** *er tænastustovnur í undirvísingarverkinum. Landsmiðstøðin sýnir fram og lænir út undirvísingarmiðlar, hevur verkstaðarmøguleikar, hevur saman við Mentamálaráðnum eina lærugreinaráðgevaskipan og skipar fyri skeiðum við fakligum og námsligum innihaldi.*

## Ættarstevna í Vestmanna

**– Fjarðafamiljan –**

**ættað frá Ole Zachariasen og Gretu Jacobsen**

**leygardagin 26. juni 2004**

**kl. 15.00** Kirkjugongd í Vestmanna kirkju
**kl. 16.00** Miðhøllin í skúlanum opin fyri veitslugestum at fáa sær navnafrámerkir – høvi verður at síggja gamlar og nýggjari myndir, ættatalvur og at fáa sær ein drekkamunn afturvið ættarpráti.
– Ættarbók verður til sølu –
**kl. 18.00** Borðhald. Aftaná borðhaldið verður farið uppá gólv, og so fara Vestmenn at spæla til dans.
Náttbussurin fer frá skúlaøkinum til Havnar kl. 23.30 og 03.30.

Sunnudagin kl. 15 er ætlanin at børn og vaksin fara gongutúr (ein tíma gongd) til Bjarghyl.

**Fyrireikararnir**

## Eiðis skúli

### Søkt verður eftir lærarum til Eiðis skúla

- 2 tíðaravmarkað størv skúlaárið 2004/2005 fyri lærarar í farloyvi. Størvini eru fulltíðarstørv.

Skúlanum tørvar m.a. lærarar, ið kunnu undir´visa í alisfrøði, tónleiki, KT og svimjing (gentur).

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Meira kann fáast at vita um størvini frá fyrstalæraranum á tlf. 423579 ella 229045.

Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera Skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 24. juni 2004.

**Skúlastýrið**
/Annika Egholm
470 Eiði

Eiðis skúli hevur undirvísing 1.-7. árgangi. Skúlin er fyri kortum bygdur út við serstovum, lærarahølum og ítróttarhøll, og hevur góðar umstøður til næmingar og lærarar. Komandi skúlaár verða 6 lærarar og 77 næmingar í Eiðis skúla.